# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
Niels Petersen
niels@sosialurin.fo
tlf. 341800

*- Eg haldi, at vit taka bara ein dyst í senn, sum Óli Hansen, plagdi at siga*
*Tróndur Kragesteen, Neistin*

# United eru tryggjaðir



*Wayne Rooney, ein av málskjúttunum hja Manchester United í gjárkvøldið*

**Seinastu átta dystirnar í fjórða umfari í Champions League vórðu spældir í gjárkvøldið, og við fjórða sigrinum í bólkinum, hevur Manchester United tryggjað sær luttøku, útyvir bólkaspælið í Champions League. Tað gjørdu teir, tá teir vunnu 4-0 móti Dynamo Kiev, heima á Old Trafford**

FÓTBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Manchester United fekk í kvøld vitjan av ukreinska Dynamo Kiev heima á Old Trafford. Vann Manchester United dystin, samstundis við at Sporting Lissabon ikki fekk fulla úrtøku móti AS Roma, hevði enska felagið leikt seg víðari.

Stór útskifting var framd á liðnum síðan stórdystin ímóti Arsenal seinasta vikuskifti. Hóast hetta var United greitt omaná, og tað var júst ein av teimum óroyndu, sum slapp at skora fyrsta málið. Tað var miðverjin Gérard Pique. Hetta var í 31. minutti, og seks minuttir seinni økti Carlos Tevez.

Í seinna hálvleiki slógu Wayne Rooney og Cristiano Ronaldi United-sigurin fastan, og endaliga úrslitið gjørdist tískil 4-0.

Manchester United eru nú víðari í Champions League, meðan AS Roma og Sporting Lissabon berjast um seinasta plássið, ið tryggjar víðari luttøku.

### Fýra stjørnuskot færri í Arsenal

Arsenal vóru á vitjan í Kekkiska høvuðstaðnum Prague, har teir vitjaðu Slavia Prague, og hóast Arsenal vóru uttan fýra av størstu stjørnunum – Fabregas, Touré, Hleb og Rosicky – megnaðu teir at fáa við sær eina stigið til onglands aftur. Úrslitið gjørdist málleysur javnleikur

### Barcelona og Lyon vístu klassa

Lyon høvdu vitjan av VfB Stuttgart í gjárkvøldið, og har tóktist ganga eftir ætlan, tí úrslitið varð 4-2 til heimaliðið. Eisini á Camp Nou í Barcelona fingu vertirnir eitt pent úrslit, teir vunnu 2-0 móti Glasgow Rangers. Sostatt fekk Katalonska stórfelagið uppreisn fyri málleysa javnleikin í Glasgow, fyri tveimum vikum síðan.

### Inter vísir styrki

Í Milano fingu Inter ikki sørt av trupuleikum av russunum úr CSKA Moscow. Úrslitið gjørdist 4-2. Hóast russar vóru á odda 0-2, vildu argentinski Esteban Cambiasso og svenski Zlatan Ibrahimovic tað annaleiðis, tí við tveimum málum hvør, fingu teir vent úrslitinum og vunnu at enda rættuliga sikkurt.

## FAKTA

**Úrslit og málskorarar frá dystunum í gjárkvøldið:**

**Lyon – Stuttgart 4-2 (1-0)**
1-0: Ben Arfa
1-1: Kallstrøm
2-1: Gomez
3-1: Ben Arfa
3-2: Gomez
4-2: Pernambucano

**Barcelona – Rangers 2-0 (2-0)**
1-0: Henry
2-0: Messi

**Man Utd – Dynamo Kiev 4-0 (2-0)**
1-0: Pique
2-0: Tevez
3-0: Rooney
4-0: Ronaldo

**Sporting – Roma 2-2 (0-1)**
0-1: Casetti
1-1: Da Silva Muniz
2-1: Da Silva Muniz
2-2: Polga

**Steua Bucarest – Sevilla 0-2 (0-1)**
0-1: Renato
0-2: Renato

**Slavia Prague – Arsenal 0-0 (0-0)**

**Fenerbahce – PSV 2-0 (2-0)**
1-0: Marcellis
2-0: Semih

**Inter – CSKA Moscow 4-2 (2-2)**
0-1: Jó
0-2: Love
1-2: Ibrahimovic
2-2: Cambiasso
3-2: Cambiasso
4-2: Ibrahimovic

# Jónhard er lekrastur

**NSÍ vinnur tað heila - í gjár varð Jónhard Frederiksberg valdur til Føroya lekrasta fótbóltsspælara**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í gjár fall avgerðin um, hvør er Føroya lekrasti fótbóltsspælari, og valið fall á Jónhard Frederiksberg úr NSÍ.

Tað er ungdómssendingin Pink, sum hevur skipað fyri kappingini seinastu vikurnar, og í gjár vóru finalistarnir til endaligu próvtøkuna. Ein spælari úr hvørjum av Formula-liðnum hevði vunnið seg fram til finaluna, sum varð avgjørd við SMS-atkvøðugreiðslu.

Og her gjørdist úrslitið altso, at Jónhard Frederiksberg varð kosin sum tann lekrasti av øllum. Hann vann framman fyri Jón Krosslá Poulsen úr VBSumba og Sam Jacobsen úr GÍ. Hinir finalistarnir vóru Røgvi Poulsen (AB), Bergur Midjord (B36), Gert Hansen (EB/Streymur), Meinhardt Joensen (KÍ), Pauli G. Hansen (Skála), Rókur av Fløtum Jespersen (HB) og Símin Hansen (B71).


*Talan var um harðan dyst, men eisini tá tað ráddi um at finna lekrasta spælaran í landinum, stóðu runavíkingar ovastir*

## Støðan í bólkunum er:

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Bólkur E:** | | | | | | | |
| Barcelona | 4 | 3 | 1 | 0 | 7 | 0 | 7 |
| Rangers | 4 | 2 | 1 | 1 | 5 | 3 | 7 |
| Lyon | 4 | 2 | 0 | 2 | 6 | 8 | 6 |
| Stuttgart | 4 | 0 | 0 | 4 | 3 | 10 | 0 |
| **Bólkur F:** | | | | | | | |
| Man Utd | 4 | 3 | 0 | 0 | 10 | 2 | 12 |
| Roma | 4 | 2 | 1 | 1 | 6 | 4 | 7 |
| Sporting | 4 | 1 | 1 | 2 | 5 | 6 | 4 |
| Dynamo Kiev | 4 | 0 | 0 | 4 | 3 | 12 | 0 |
| **Bólkur G:** | | | | | | | |
| Inter | 4 | 3 | 0 | 1 | 4 | 2 | 9 |
| Fenerbahce | 4 | 2 | 2 | 0 | 3 | 2 | 8 |
| PSV | 4 | 1 | 1 | 2 | 2 | 3 | 4 |
| CSKA Moscow | 4 | 0 | 1 | 3 | 6 | 10 | 1 |
| **Bólkur H:** | | | | | | | |
| Arsenal | 4 | 3 | 1 | 0 | 11 | 0 | 10 |
| Sevilla | 4 | 3 | 0 | 1 | 8 | 6 | 9 |
| Slavia Prague | 4 | 1 | 0 | 3 | 4 | 12 | 3 |
| Steua Bucaresti | 4 | 0 | 0 | 4 | 2 | 7 | 0 |